## Sólsker skal venja VÍF

Á heimasíðu sínari boðar VÍF frá, at Jónleif Sólsker í komandi kappingarári skal venja besta manslið felagsins. Hann tekur við eftir dananum Morten Hust Petersen, sum fyri viku síðan gjørdi avtalu við Stjørnuna. Jónleif Sólsker hevur drúgvar royndir á hondbóltsvøllinum, og sum leikari og venjari hevur hann vunnið ikki færri enn 11 FM-heiti. Hann hevur í sínari yrkisleið spælt fyri Kyndil, StÍF og VÍF. Sáttmálin er galdandi frá komandi kappingarári.



## Spæla umaftur 1. apríl

Nú er ásett, at umdysturin millum mansliðini hjá Neistanum og VÍF skal spælast mikukvøldið 1. mars klokkan 20. Hetta er dysturin, sum Neistin upprunaliga vann 18. januar, men sum VÍF síðani kærdi, tí eitt mál var tikið frá liðnum í hálvleikssteðginum. Eftir viðgerð í bæði kappingarnevndini og dómsnevndini hjá Hondbóltssambandinum og Ítróttardómstólinum, var niðurstøðan ein og hin sama, at dysturin skuldi spælast umaftur.

# Svimjararnir fáa ein hvøkk

**Danski elitusvimjarin, Jeanette Ottesen, gevur estiska professaranum Rein Haljand bestu skoðsmál, men viðgongur, at úrslitini í fyrstu greiningini góvu henni ein hvøkk, tí hon var so langt frá málinum. – Hasin maðurin er eitt flogvit, sigur hon**

SVIMJING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Skalt tú røkka úrslitum innan svimjing, er bara ein vegur: Venjing, venjing og aftur venjing. Men tað er ikki líkamikið, hvussu venjingin verður løgd til rættis, og fyri at fáa sum mest burturúr, hevur Svimjisambandið nú gjørt avtalu við estiska professaran, Rein Haljand, sum tvær ferðir um árið næstu trý árini fer at kanna og greina føroyskar svimjarar.

Við sjónbandsupptøkum kannar hann svimjiteknikkin hjá tí einstaka. Síðani verða upptøkurnar greinaðar og góð ráð givin um, hvussu teknikkurin kann betrast. Longu um vikuskiftið verða teir fyrstu 16 føroysku svimjararnir kannaðir og greinaðir.

At miðvísa arbeiðið hjá Haljand Rein gevur úrslit, sum veruliga muna, eru fleiri danskir svimjarar góð dømi um, tí har hevur hann verið inni í myndini í fleiri ár.

Danski elitusvimjarin, Jeanette Ottesen, er bara 21 ára gomul, men longu nú bjóðar hon heimselituni av, og har eru svimjararnir allir millum 25 og 30 ár. – Hasin maðurin er eitt flogvit, tí hann sær nøkur ting, sum eingin annar leggur til merkis, sigur hon um Rein Haljand.

Samstundis viðgongur hon, at hon fekk ein hvøkk av úrslitunum í fyrstu greinini, Haljand gjørdi av svimjiteknikki hennara. Tað ber til at røkka 100 prosentum í kanningunum hjá honum, men fyrstu ferðina, tá hon sum 16 ára gomul var kannað í 2004, rakk hon bara upp á 50 prosent:

– Eg fór at undrast á, um eg veruliga dugdi at svimja, tí hann fortaldi mær um bæði eitt og annað, sum eg gjørdi skeivt, og at enda helt eg, at eg einki gjørdi rætt. Tað var sera niðurtrykkjandi, fortelur Jeanette Ottesen í samrøðu við danska Jyllands-Postin.

Síðani hevur hon fylgt ráðunum frá estiska professaranum, og nú fimm ár eru liðin síðani fyrstu greiningina hjá Rein Haljand, skorar hon 98 prosent, og teknikkurin er broyttur so nógv til tað betra, at nú svimur hon næstan tríggjar metrar í hvørjum taki, í staðin fyri tveir, sum hon gjørdi frammanundan.



*Pál Joensen og Jón Bjarnason vóru í januar yviri í Tallinn í Estlandi, har Rein Haljand kannaði og greinaði svimjingina hjá Páli*

## Avgerandi dystur hjá Heina í dag

**Dysturin seinnapartin í dag hjá Heina og teimum í Ajax Keypmannahavn verður vístur beinleiðis í TV2 Sport. Teir skulu vinna fyri at varðveita plássið í bestu deildini**



*Seinnapartin í dag, frá klokkan 17.10 ber til at fylgja við í avgerandi dystinum hjá Heina Hanusarson og Ajax Keypmannahavn á heimavølli ímóti Nordsjælland Håndbold*

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Seinnapartin í dag, klokkan 17.10, ber til at síggja Heina Hanusarson og Ajax Keypmannahavn live á donsku rásini TV2 Sport, tá liðið í einum sera avgerandi dysti hevur heimavøll í Bavnehøj-høllini ímóti Nordsjælland Håndbold.

Nú komið er til 24. umfar í CBB Mobil-liguni, stendur serliga nógv upp á spæl hjá Heina og teimum, tí kravið undan dystinum er ein sigur, um Ajax Keypmannahavn skal varðveita møguleikan at verða verandi í bestu donsku hondbóltsdeildini hjá monnum.

Síðstu vikuna hevur Heini ikki fingið vant saman við donsku liðfeløgunum, tí hann hevur verið við føroyska manslandsliðnum til báðar dystirnar í HM-undankappingini ímóti Sveis. Tí er óvíst, um hann verður við frá byrjan í dystinum seinnapartin.

Men í báðum dystunum ímóti Sveis fekk hann í øllum førum víst, at knotur eru í honum, og eftir útidystin í Appenzell leygarkvøldið var hann av sveisarunum kostin besti føroyski spælarin. Hann gjørdist eisini toppskjútti í dystinum við átta málum,

# Íslendingar hópvrakaðir

**Ikki færri enn fimm føroyingar spældu sín fyrsta A-landsdyst sunnudagin, tá Føroyar vunnu 2-1 á Íslandi, sum í sínum lagi hevði átta spælarar á vølli fyri fyrstu ferð**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Í føroysku byrjunaruppstillingini vóru longu tveir debutantar. Bæði málverjin, Gunnar Nielsen, og miðvallarin, Gudmund Nielsen, vóru fyri fyrstu ferð á vøllinum í einum A-landsdysti fyri Føroyar. Men teir skuldu ikki gerast teir einastu.

Tá 18 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, var Gudmund avloystur av Christiani Restorff Mouritsen, og átta minuttir fyri tíð kom Páll Mohr Joensen á vøllin fyri Andreas Lava Olsen. Í yvirtíðini, eftir at Ísland hevði minkað um munin, fekk eisini Levi Hanssen tveir minuttir á vøllinum, tá hann avloysti Boga Løkin.

Hesir fimm nýggju fingu sostatt part í fyrsta føroyska landsliðssigrinum í hálvtfimta ár – ella í 30 dystir. Síðsti føroysku sigurin undan hesum var tann 18. august í 2004, tá Føroyar vunnu 3-2 á Malta í vinardysti á Svangaskarði.



*Gudmund Nielsen, sum her er á bóltinum millum vinir og fíggindar, var ein av fýra føroyingum, sum fingu sín fyrsta landsdyst í søguliga sigrinum á Íslandi sunnudagin*

*Mynd: Kjartan Þorbjörnsson/ Morgunblaðið*

### Fleiri íslendingar

Skuldi onkur hildið, at nógvir føroyskir debutantar vóru í hesum eina og sama dystinum, so var tað tó lítið aftur ímóti tí, íslendingar borðreiddu við í dystinum sunnudagin. Har vóru ikki færri enn átta spælarar, sum fyri fyrstu ferð komu á vøllin í A-landsdysti.

Guðjón Árni Antoníusson, Guðjón Baldvinsson og Rúrik Gíslason byrjaðu inni, og síðani komu Óskar Örn Hauksson, Matthías Vilhjálmsson, Gunnar Már Guðmundsson, Kristinn Jónsson og Guðmundur Kristjánsson inn seinni í dystinum.

Av teimum tilsamans 17 spælarunum, sum vóru við ímóti Føroyum, eru tað bara Jóhann Berg Guðmundsson úr AZ Alkmaar og Bjarni Ólafur Eiríksson úr Vali, sum hava fingið afturval, nú íslendski hópurin til útidystin í HM-undankappingini ímóti Skotlandi um eina viku er úttikin.